Kappingareftirlitið

**Fuglafjarðar kommuna**

**Ennisvegur 38**

**530 Fuglafjørður**

J.nr. 17/00071

Tórshavn, 12.06.2017

**Avgerð viðvíkjandi loðsbátatænstuvirksemi á Fuglafirði**

Tann 9. desember 2016, fekk Kappingareftirlitið kunning um viðurskifti í sambandi við loðsbátatænstuvirksemi á Fuglafirði, ið møguliga vóru í stríð áseting í kappingarlógini. Eftir at hava viðgjørt málið, kom Kappingareftirlitið til ta niðurstøðu, at Fuglafjarðar kommuna fremur brot á § 12 í kappingarlógini, við at geva framíhjárættindi til egna loðsbátatænastutilbúgving, og harvið avmarka møguleikarnar hjá øðrum veitarum at virka á Fuglafirði.

Í hesum sambandi, varð uppskot til avgerð sent Fuglafjarðar kommunu til hoyringar, tann 19. apríl 2017. Tann 11. mai 2017, fekk Kappingareftirlitið svarskriv frá Fuglafjarðar kommunu, har kommunan, á eykabýráðsfundi tann 10. mai 2017, avgjørdi at taka niðurstøðuna hjá Kappingareftirlitið til eftirtektar og ógilda býráðssamtyktina frá 27. november 2014, har avgjørt varð, at egin loðsbátatænastutilbúgving skuldi vera fyrsta val á Fuglafirði.

Tann 31. mai 2017, sendi Kappingareftirlitið skriv til Fuglafjarðar kommunu, har biðið varð um skjalprógv fyri, at avgerðin um at ógilda býráðssamtyktina frá 27. november 2014 hevði fingið virkna. Tann 6. juni 2017, fekk Kappingareftirlitið svar frá Fuglafjarðar kommunu, har kommunan í hjálogdum skrivi vísti á, at havnarstjórin í Fuglafjarðar havn hevði fingið kunning um, at býráðið, á eykabýráðsfundi tann 10. mai 2017, hevði avgjørt at taka niðurstøðuna hjá Kappingareftirlitinum til eftirtektar og ógilda býráðssamtyktina frá 27. november 2014.

Avgerðin hjá Fuglafjarðar kommunu merkir, at verandi kappingaravlagandi virksemi heldur uppat, og at loðsbátatænastufeløg, ið halda fyrisett krøv í loðslógini og kunngerðum hennara, framyvir kunnu kappast á jøvnum føti á Fuglafirði.

Kappingareftirlitið hevur í hesum sambandi avgjørt at niðurleggja málið.

Vegna Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson

deildarstjóri

Rúni J. Niclassen

fulltrúi